# Stór framstig fyri tey gomlu

**Dagurin í dag er ein stórur dagur hjá Heimarøktini í Eysturoy. Bæði á Toftum og í Leirvík verða eldrasambýlini, sum nú standa liðug og klár at taka í nýtslu, sýnd fram fyri bygdafólkinum**



*Pláss er fyri 10 búfólkum í eldrasambýlinum í Leirvík, sum nú er liðugt og klárt at taka í nýtslu. Kostnaðurin liggur um 9-10 miljónir krónur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

ELDRARØKT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Toftum verður høvið at síggja eldrasambýlið millum kl. 14 og 17 og hósdagin, 9. september, verður húsið sýnt fram fyri innbodnum.

Í Leirvík kunnu bygdarfólkini síggja húsið í dag millum klokkan 13 og 16 og týsdagin, 7. september, verður sambýlið víst fram fyri innbodnum.

Bæði á Toftum og í Leirvík byrja tey at taka búfólk inn, 1. september.

### 10 fólk í Leirvík

Í eldrasambýlinum í Leirvík verður pláss fyri 10 búfólkum, og Sjúrður Eliasen, borgarstjóri, sigur, at hesi sleppa inn á sambýlið so við og við.

– Tað fer at taka nakrar dagar, áðrenn øll eru sloppin inn, tí neyðugt er at fáa fólkini upp á pláss so hvørt, tey koma.

Hann væntar tó ikki, at tað fer at taka drúgva tíð, áðrenn øll 10 búfólkini eru komin upp á pláss í eldrasambýlinum.

Sjúrður Eliasen sigur, at kostnaðurin av sambýlinum í Leirvík fer at liggja millum 9 og 10 miljónir krónur.

### 16 fólk á Toftum

Marjun Gaardbo, borgarstjóri í Nes kommunu, sigur, at eldrasambýlið á Toftum hevur pláss fyri 15 búfólkum og eitt pláss er til umlætting.

Hon sigur, at átta búfólk sleppa inn á sambýlið teir næstu dagarnar, og síðan verður pláss fyri átta fólkum aftrat.

Marjun Gaardbo sigur, at eldrasambýlið á Toftum kostar slakar 14 miljónir krónur, nú tað stendur liðugt og klárt at taka í nýtslu.



*Høvið verður hjá bygdafólkinum í Nes kommunu og Leirvíkar kommunu at síggja eldrasambýlini í dag. Á Toftum (mynd) er pláss fyri 15 búfólkum, og eitt pláss er til umlætting*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Eldrasambýlið í Gøtu liðugt í heyst

**– Vit hava fingið játtan til 10 búfólk, men enn vantar okkum játtanina til tey seinastu seks fólkini, sum væntandi flyta inn komandi ár, sigur Haldóra Ranghamar, borgarstjóri**



*Tá ið eldrasambýlið í Gøtu ætlandi letur upp, 1. november í ár, flyta í fyrsta lagi 10 búfólk inn. Seks fólk flyta inn seinni, men alt húsið verður gjørt liðugt í einum, sigur Haldóra Ranghamar, borgarstjóri*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

ELDRARØKT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eldrasambýlið, sum Gøtu kommuna letur byggja í Norðragøtu, verður einar tveir mánaðir seinni liðugt enn sambýlini, sum bygd verða í Leirvík og á Toftum.

Haldóra Ranghamar, borgarstjóri í Gøtu, sigur, at nú líður hampiliga væl við arbeiðinum, og hon væntar, at heimið stendur liðugt 1. November í ár, sum er eitt lítið sindur seinni enn upprunaliga ætlað.

– Tað er soleiðis, at tá ið kommunur byggja eldrasambýlir, rindar landið 50.000 krónur av íløguni fyri hvørt búfólk. Higartil hava vit bert fingið játtan til tey fyrstu 10 plássini, men vit vænta, at játtanin til tey seks plássini, ið eftir eru, kemur uppá pláss til komandi ár, sigur hon.

Tá ið eldrasambýlið í Gøtu ætlandi letur upp, 1. november í ár, flyta í fyrsta lagi 10 búfólk inn.

– Men alt verður gjørt liðugt í einum, og tískil verður eisini gjørt klárt til tey seks fólkini, sum seinni skulu flyta inn í niðaru hæddini, sigur borgarstjórin.

Tað er eitt stórt tak hjá kommununum at byggja slík sambýlir, tá ið landið rindar ein so lutfalsliga lítlan part av íløguni.

Haldóra sigur, at tá ið ellisheim verða bygd, rindar landið hálva miljón av íløguni fyri hvørt búfólk, men bert 50.000 krónur, tá ið talan er um eldrasambýlir.

– Hetta er ein velduga stórur munur, hóast funktiónirnar á einum eldrasambýli og einum ellisheimi ikki eru so ólíkar.

### Alt útboðið

Øll byggingin av eldrasambýlinum í Gøtu hevur verið útboðin.

JHR tók sær av útgrevstrinum og betongarbeiðinum, Búsetur ger timburarbeiði, Rók-El hevur el-arbeiði, Sofus Jacobsen hita-og sanitet, Anskar Hansen máling, og Profa hevur gólválegging.

Gøtu kommuna ætlar, at alt húsið og økið uttan um skal verða liðugt, tá ið eldrasambýlið verður tikið í nýtslu.

Zacharias Jacobsen í Syðrugøtu hevur soleiðis átikið sær at snøgga økið uttan um.

Eldrasambýlið í Gøtu fer væntandi at kosta einar 16 miljónir krónur, tá ið tað verður tikið í nýtslu seinni í heyst.

# Útgerðin komin

Í summar boðaði Televarpið frá, at tey í næstum skuldu fara undir at útbyggja sendinetið, og nú er felagið komið eitt stig longur í hesum.

Størsti parturin av útgerðin til útbyggingina er nú komin til landið, og í komandi mánaði byrjar so sjálvt arbeiðið við uppsetingini.

Í fyrsta lagi verða tað fólk í Hósvík, sum koma at síggja Televarpið, tá nýggja útbyggingin er liðug, og síðani er ætlanin at víðka um hesa útgerð, soleiðis at hon eisini røkkur norður í Sundalagið.

Eftir hetta verða Vestmanna og Vágoyggin næstu økini, sum kunnu taka móti signalinum frá Televarpinum.

Hetta er triðja útbyggingarstigið hjá Televarpinum, og tá hetta er liðugt, hava á leið 80% av føroyingum møguleika at síggja Televarpið.

Og sum tað áður hevur verið nevnt, so er eisini útlendskur áhugi fyri senditøknini hjá Televarpinum. Talan er um sera framkomna tøkni, sum fleiri av grannalondum okkara eisini eru í ferð við at seta upp, so tað kann staðfestast, at Føroyar á hesum økinum hava verið undangonguland.

-jm

# Sambýlið alment latið upp

**Sambýlið fyri sinnisveik, sum er í Sandavági, varð hósdagin alment tikið í nýtslu. Hetta er tað fyrsta av sínum slag, men tað koma fleiri, lovaði landsstýrismaðurin**

SAMBÝLI
*Edvard Joensen*



*Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, handaði Signu Andreasen leiðara í sambýlinum Undir Fobbakletti gávu, tá latið varð alment upp*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Sandavági:** – Hetta er tað fyrsta sambýlið av sínum slag, men verður ikki tað seinasta, segði Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður við almanna- og heilsumálum, tá sambýlið fyri sinnisveik, varð alment tikið í nýtslu hósdagin.

Landsstýrismaðurin legði dent á orðið IKKI, og tað er einki at ivast í, at fleiri teirra, sum vóru til staðar, fara at minnast tað.

Hóast tað ikki fyrr enn nú er alment, at húsið er tikið í brúk, hava fólk búð í tí síðan umleið hálvan juli.

Signa Andreasen, leiðari i sambýlinum, segði í síni røðu á samkomu hósdagin, at tað var hugaligt at síggja, hvussu væl fólkini trívast í hesum frálíka umhvørvinum.

– Vit síggja sjónligan mun, frá tí tey komu higar, til í dag, segði hon. Hon fegnaðist eisini um, at útlit eru fyri, at hendan gongdin við bústaðarmøguleikum til sinnisveik fer at halda fram.

Talan er um fólk, sum hava búð á psykiatriskari deild á Landssjúkrahúsinum, ið nú eru og fara at flyta eitt nú til Sandavágs.

Hetta var eisini upp á tíðina, segði landsstýrismaðurin millum annað. Tí hesi fólkini hava einki sum helst at gera á einum sjúkrahúsi.

Svenning av Lofti, sum í mong ár var formaður og myndaði felagið Sinnisbata, heilsaði eisini vegna Sinnisbata sambýlinum vælkomnum. Hann fegnaðist sum hinir røðararnir um, at nú er nátt so langt, at almenna samfelagið hevur fingið sett eitt sambýli á stovn. Tey, sum áður hava verið, eru annaðhvørt rikin av privatum ella hálvalmennum felagsskapum, segði hann.

Hann fegnaðist um góðu umstøðurnar, tey hava í Sandavági, men minti á, at hetta skuldi ikki bara vera eitt hús, men eitt heim fyri fólkini, sum búgva skulu her.

Eisini formaðurin i Psykiatrifelag Føroya, Sjúrður Norðbúð, heilsaði heiminum vælkomnum og fegnaðist um góðu umstøðurnar.



*Svenning av Lofti hevur í nógv á staðið í fremstu røð í stríðnum fyri at náa so langt, sum nú er komið, teimum sinnisveiku at bata*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Búfólkini hava góðar og hugnaligar umstøur at búleikast í*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nýggjur MBM bygningur í Hoyvík

**MBM byggir nýggjan fyrisitingar- og handilsbygning við síðuna av mjólkarvirkinum í Hoyvík. Bygningurin verður væntandi klárur at taka í brúk í februar**

BYGGING
*Edvard Joensen*



*Nýggi bygningurin, sum fer at savna virksemið hjá MBM, verður bygdur við síðuna av mjólkarvirkinum í Hoyvík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Meginfelag Búnaðarmanna fer at savna alt virksemi sítt í Hoyvík. Ein stórur bygningur er reistur við síðuna av mjólkarvirkinum, har handil og fyrisiting fara at húsast.

– Hetta er ein beinleiðis avleiðing av eldinum, sum var í Kollafirði, tá fóðurgoymslan brann í grund, sigur Dánjal Thomsen, fíggjarstjóri hjá MBM. Vit hava valt at flyta alt á eitt stað, soleiðis at vit eisini flyta skrivstovurnar úr Búnaðardeplinum í Kollafirði, har vit hava leigað fá Royndarstøðini.

Nýggi bygningurin í Hoyvík er í trimum hæddum, men samlaða hæddin er sum ein bygningur í fýra hæddum.

Tvær tær niðastu hæddirnar eru gjørdar til eina, og har fer fóðurgoymslan at vera. Í miðhæddini verður handil við landbún-aðarútgerð, eins og nakrar skrivstovur, kantina og fundahøli verða har. Í ovastu hæddini verða skrivstovur og goymsla til handilin, sigur Dánjal Thomsen.

Hann sigur, at samlaði kostnaðurin er mettur at liggja um 12,5 milliónir krónur, sum svara til umleið 7.000,- krónur fyri hvønn fermetur.

Bygningurin er gjørdur úr betongelementum, sum komin eru úr Aalborg. Eitt danskt felag setir upp. Restina av arbeiðinum fara føroyskar fyritøkur at gera, sigur Dánjal Thomsen.

# Fyrispurningur um kirkjuvígslur

Bill Justinussen hevur sent Jógvan á Lakjuni, landstýrismanni í mentamálum munnligan fyrispurning um støðuna, sum landsins myndugleikar hava til tær broytingar, sum tykjast vera ávegis innan fólkakirkjuna.

Tingmaðurin vísir á, at tað nærum dagliga berast tíðindi um støðuna, sum danska fólkakirkjan kann í, um ein meiriluti á Fólkatingi tekur undir við uppskotinum um kirkjuliga vígslu av samkyndum.

Hann heldur, at kirkjan við hesum kemur í stríð við sjálvan grundvøllin, sum hon stendur á, og at hetta er til miklan ampa millum kristin fólk í Føroyum.

Tingmaðurin heldur ikki, at tað í almenna orðaskiftinum framgongur nóg greitt, hvørja støðu landsmyndugleikarnir hava í málinum, og vil tí hava at vita, hvør avleiðingin verður fyri føroysku fólkakirkjuna, um donsk lógarbroyting hevur við sær, at loyvt verður at víga fólk av sama kyndi. Somuleiðis spyr hann ,um landsstýrismaðurin hevur ítøkiligar ætlarnir til tess at byrgja fyri, at føroysku fólkakirkjuni kann verða álagt slíkar skyldur.

-jm